Neistin-VÍF 27-38 (14-17):

# VÍF-maskinan koyrdi Neistan um koll

**Neistin fylgdi við vestmenningum í trý korter, men seiansta korterið gekk orkan undan, og tá VÍF samstundis setti ferð á, gjørdist talan um satt málrok**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Neistin fylgdi við í trý korter, men spæl teirra er í ov stóran mun bygt kring fáar lyklaleikarar, og tá orkan hjá hesum gekk undan, kundu vestmenningarnir seta turboløðarin til, so talan at enda gjørdist um sanna málveitslu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tó at vestmenningar vóru favorittar móti Neistanum sunnudagin, so mundi fáur ivast í, at skuldi talan gerast um sigur, so skuldu tier gulu leggja alla orku í. Ikki minst tí Neistin við avrikunum í ár hevur prógvað, at hóast liðið hevur mist hópin av sterkum leikarum, so hevur liðið ein stríðsvilja, sum kann bera heilt langt, um væl vil til.

## Ingi uttanfyri

Og fyrstu longu løtuna av dystinum var eisini sjón fyri søgn, at her skuldu vestmenningarnir ikki rokna við nøkrum sum helst. Kanska var spælið hjá VÍF eitt sindur ávirkað av, at Ingi Olsen hevði valt at byrja uttan fyri fyrstu góðu løtuna, men tað darvaði á ongan hátt teimum bláu. Serstakliga tóktist Morgan Knezevic vera sera væl upplagdur. Hann skoraði mest sum eftir vild, og var ov trongt fyri, var hann aloftast førur fyri at finna leysar viðleikarar, so hesir kundu skora.

VÍF hekk alla tíðina í, men uttan Inga gjørdist spælið í stóran mun ov stirvið, soleiðis at blái verjumúrin mest sum alla tíðina fekk flutt seg á rætt stað, áðrenn skotsterku bakspælararnir hjá VÍF fingu løtt kanónirnar, og fram til seinastu fimm minuttirnar undan steðginum vóru tað teir bláu, sum tóktust at hava takið.

## Breiddin er styrkin

At Ingi Olsen kann loyva sær sjálvum at sita næstan ein heilan hálvleik á beinkinum, sigur kanska nakað um, hvussu breiður hópurin hjá VÍF er. Ikki minst, tá tað samstundis verður hugsað um, at Sámal Joensen ikki verður við í ár.

Seinastu løtuna undan steðginum kom venjarin á vøllin sjálvur, og tað var heilt skjótt, at hetta broytti spælið. Væl meira av ferð kom á í uppspælinum. Verjan fekst nú eisini at rigga munandi betri, soleiðsi at Eli Müller fekk framt nakrar bjargingar, og við eitt kom gongd á vandamikla kontraspælið hjá teimum gulu.

Og í seinna hálvleiki varð turbo'in veruliga sligin til. Fyrstu løtuna fekk Neistin framvegis hildið fast, men so gekk orkan undan. Í mun til VÍF er hópurin hjá Neistanum ov smalur. Leikliga ábyrgdin verður í sera stóran mun løgd á teir báðar, Morgan Knezevic og Áka Mørk, og ímóti einum liði sum VÍF er hetta ov nógv í samfullar 60 minuttir. Einsamalli rmegnaðu teir ikki at halda teimum bláu í dystinum, og um miðjan hálvleikin skrædnaði.

Neistin hevði tá strítt seg upp á 22-22, men meðan teir fingu fimm mál restina av dystinum, fekk VÍF ikki færri enn 16, og var tað ikki fyri stórspæl frá Zeljko Jotic í málinum, kundi talan væl verið um nógv størri sigur til meistararnar.

Við sigrinum skeyt VÍF seg upp á ovastu rók, og mikukvøldið fæst helst ein ábending um, hvussu drúgvir teir verða á hesum plássinum. Tá kemur StÍF á vitjan, og tó at strandingar hava tóktst sera sterkir fyrr í ár, so benda seinastu avrikini á, at kurvan nú peiggjar nakað niðureftir. Hjá VÍF er júst øvugt. Seinastu dystirnar hevur maskinan koyrt við fullari ferð, og megna teir at hava somu kraft á spælinum mikudagin, skal meira enn vanligt stórspæl til hjá strandingunum, um teir skulu gera sær vónir um at endurtaka sigurin frá fyrra dystinum.

Hóast stórtapið, so er langt ífrá víst, at Neistin skal avskrivast. Sum nevnst, so líður liðið kanska undir, at spælið í ov stóran mun er bygt á Morgan og Áka, men hinvegin er tað so langt ífrá altíð, at mótstøðuliðið hevur somu breidd, sum vestmenningarnir hava. Stríðsviljin hevur borið liðið langt higartil, og megna teir framhaldandi at halda hesum uppi, samstundis sum roynt verður at brýna ungu leikararnar til stóru uppgávurnar, so er ikki heilt óhugsandi, at liðið framhdaldandi kann verða partur av stríðnum um heiðursmerki.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VÍF 27-38 (14-17)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Áki Mørk 10(3), Morgan Knezevic 8, Dann Thorleifsson 3, Helgi Justinussen 3, Ragnar Stakksund 1, Kári Mortensen 1, Ræni Slættanes 1
**VÍF:** Áki Olsen 7, John Zachariasen 7, Ingi Olsen 7, Daniel Rápa 4, Áki G. Olsen 4(1), Piti Negru 4, Agnar Joensen 2, Petur Frank Olsen 2, Fríðbjørn Seloy 1
**Brotskøst:** Neistin 3, VÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 1
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Yvirhøvur var talan um ein reinan dyst, og hesum eiga dómararnir væl sín part av æruni fyri.

StÍF-Tjaldur 21-15 (10-6):

# Eingin ivi á Skála

**StÍF er nú á triðja plássið á stigalvuni, og komandi vikuskiftið fæst at vita, hvørt hetta er meint í álvara**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir fleiri góð avrik seinastu dystirnar varð roknað við, at kvinnurnar hjá StÍF fóru at gera av við Tjaldur, sum enn ikki hevur fingið ferð á, hóast liðið í fleiri førum hevur verið nær við at fáa fleiri stig enn tey bæði, sum tað higartil er vorðið talan um.

Og tað var eisini skj´tt, at StÍF hevði staðfest, at her ætlaðu tær at vera við yvirlutan. Frá fyrsta bríksli royndu tær at leggja trýst á Tjaldur, og hóast Maria í gula málinum royndi at taka tað, sum kom so megnaði hon ikki einsamøll at forða fyri muninum, sum mátti koma í.

Longu eftir fyrsta korterið var gongdin greið, men tó at StÍF fyri tað mesta helt fast eftir hetta, so var tað tó um reppið, at Tjaldur aftur fekk skapt spenning í. Eitt skifti í seinna hálvleiki minkaðu tær munin niður í eitt mál, men tá StÍF aftur fekk skil á, gjørdist kortini einki.

## VÍF bíðar

Við sigirnum helt StÍF fast í stríðnum um silvurplássið, har tær í løtuni eru ájavnar VÍF í stigum. Mikudagin skal StÍF royna seg í Vestmanna, og tá fæst helst at vita, hvørt tær framhaldandi ætla sær ein leiklut í oddinum, ella um eitt nú sigurin á VÍF bert var eitt lítið upplop, sum nú er hæsað av.

Tjaldur hevur hinvegin framvegis til góðar at prógva, at tær eru nóg sterkar at standa seg í bestu deildini. Verður sæð burtur frá sigrinum á Kyndli, so hava úrslitini ikki verið nóg góð, og í løtuni eru trý stig upp til næsta liðið, sum er Stjørnan. Júst Stjørnan er næsta mótstøðuliðið hjá Tjaldri komandi vikuskifti, og spurningurin er so, hvørt Tjaldur tá fær skapt nýggjan spenning í botnstríðnum, ella um tær verða púrasta isoleraðar í niðara enda av talvuni.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Tjaldur 21-15 (10-6)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** Asta Petrauskiene 6(1), Alina Olaru 4(1), Poula D. Olsen 4, Anna B. Danielsen 3, Sunfríð B. Jacobsen 2, Kristina Griksaite 1, Ata Gregersen 1
**Tjaldur:** Beinta Joensen 4(2), Oddvá Fossdalsá 3, Kristine Ellingsgaard 2, Milica Ergic 2, Lenka Ribaric 2(1), Mona Langgaard 1
**Brotskøst:** StÍF 5, Tjaldur 5
**Útvísingar:** Tjaldur 1



## Flogbóltsúrslit og –støður

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 16-11-02 | 1K | Nøvan | Fleyr | 1-3 |
| 16-11-02 | 1K | SÍ | Mjølnir a | 3-0 |
| 17-11-02 | 1K | Dráttur | Mjølnir b | 3-0 |
| 16-11-02 | 1M | NFL | Fleyr | |
| 16-11-02 | 1M | SÍ | Fram | 1-3 |
| 16-11-02 | 2K | Nøvan | Mjølnir | 0-3 |
| 16-11-02 | 2K | TB | Fossánes a | 3-0 |
| 16-11-02 | 2M | Fossánes | Fram | 3-2 |
| 16-11-02 | 2M | Mjølnir | Nøvan | 0-3 |
| 17-11-02 | 2M | Mjølnir | Fram | 0-3 |
| 16-11-02 | D16 | ÍF | Fleyr | 3-1 |
| 17-11-02 | D16 | SÍ | Mjølnir | |
| 17-11-02 | G16 | Dráttur | Mjølnir | 3-2 |

**1. deild kvinnur**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SÍ | 3 | 3 | 0 | 9 | 0 | 9 | 6 |
| Dráttur | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| Mjølnir a | 2 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| Nøvan | 2 | 1 | 1 | 4 | 4 | 0 | 2 |
| Fleyr | 2 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| KÍF a | 2 | 0 | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| Mjølnir b | 3 | 0 | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**1. deild menn**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mjølnir a | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| Fleyr | 2 | 2 | 0 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| NFL | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| ÍF b | 1 | 1 | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| Fram | 2 | 1 | 1 | 5 | 4 | 1 | 2 |
| ÍF a | 1 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| Mjølnir b | 2 | 0 | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| SÍ | 3 | 0 | 3 | 3 | 9 | -6 | 0 |

**2. deild kvinnur**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| TB | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| Fossánes a | 3 | 2 | 1 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| SÍ | 2 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| Mjølnir | 2 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| ÍF | 1 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| Nøvan | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**2. deild menn**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fossánes | 3 | 3 | 0 | 9 | 6 | 3 | 6 |
| Fleyr a | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| Flram | 2 | 1 | 1 | 6 | 3 | 2 | 2 |
| Nøvan | 3 | 1 | 2 | 5 | 6 | -1 | 2 |
| Mjølnir | 4 | 0 | 4 | 2 | 12 | -10 | 0 |

**Gentur 16**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dráttur | 3 | 2 | 1 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| TB a | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| SÍ | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| KÍF | 2 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| Mjølnir | 3 | 1 | 2 | 5 | 6 | -1 | 2 |
| Fleyr a | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Dreingir 16**

| | Dystir leiktir | vunnir | taptir | Sett vunnin | tapt | munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mjølnir | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| SÍ | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| ÍF | 2 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| Fleyr | 3 | 0 | 3 | 1 | 9 | -8 | 0 |

# Laudrup boðar frá broytingum

**Henrik Larsen var millum áskoðararnar, tá ið Jón Rói Jacobsen spældi væl á næstbesta Brøndby liðnum. Í gjár fekk Brøndby 30 milliónir afturat at arbeiða við**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Kappingarneytarnir hjá FCK vóru í gávuhýri í vikuskiftinum. Teir góvu eina rúgvu av stigum burtur, og harvið øktist munurin frá FCK og niður til næstu kappingarneytarnar til níggju stig. FCK liðformaðurin, Peter Møller, hevur eina ferð vunnið DM við Brøndby við fimtan stigum fleiri enn næstu liðini, og hann sigur seg ikki duga at síggja, hvørjum teir nú skulu tapa ímóti.

Todi Jónsson tosar ikki so nógv um DM, men hann staðfestir, at munurin á FCK og hinum liðunum í løtuni er, at FCK spælir javnt ella vinnur, tá ið spælið ikki hongur so væl saman. Tað gera hini liðini ikki. Nú eru tað fimtan mánaðir síðani, at FCK seinast tapti landskappingardyst á heimavølli.

## Meiri pengar til Brøndy

Sunnudagin var Brøndby í Ikast og spældi ímóti FCM. Í 1. hálvleiki hevði heimaliðið fleiri møguleikar, men Mogens Krogh, veteranurin í Brøndby málinum, sum fyri ellivu árum síðani flutti úr Ikast og til Brøndby, spældi heilt væl.

Í 2. hálvleiki var Brøndby greitt omaná, men teir høvdu ilt við at fáa mál. Undan summarsteðginum varð Peter Madsen roknaður sum møguligur álopsspælari í fleiri stórum feløgum í Europa. Tað var hann, tí at hann skoraði eina rúgvu av málum fyri Brøndby. Í heyst hevur gingið av skriðuni, og aftur sunnudagin kiksaði hann fleiri upplagdar møguleikar.

19 ára gamla Thomas Reths legði Brøndby á odda, og tað tóktist vera sigursmálið. Men í síðstu løtu javnaði heimaliðið, og harvið øktist fjarstøðan frá Brøndby og upp til FCK til ellivu stig.

Michael Laudrup var ikki væl nøgdur, og hann endurtók enn eina ferð, at í vetrarsteðginum fara broytingar at verða gjørdar á Brøndby liðnum. Teir tykjast hava pengarnar til tað. Fyrrapartin í gjár varð boðað frá, at felagið hevur fingið 30 milliónir afturat at arbeiða við.

Ein av spælarunum, sum kanska ikki fer at kosta so nógv, er Jón Rói Jacobsen. Mikukvøldið í síðstu viku var hann í miðverjuni á næstbesta Brøndby liðnum, sum spældi ímóti Køge. Millum áskoðararnar var Henrik Larsen, landsliðsvenjari. Hann kundi saman við hinum staðfesta, at Jón Rói Jacobsen var ímillum teir mest eyðsýndu á Brøndby liðnum, sum vann 6–1.

## Málríkt

Triði síðsta umfarið í superliguni undan vetrarsteðginum var merkt at nógvum málum. Leygardagin hevði Esbjerg, sum er triði fremst, vitjan av OB. Talan gjørdist um sera undirhaldandi uppgerð, sum endaði 4–4!

AaB er framvegis á næstfremsta plássinum. Teir høvdu sunnudagin vitjan av AB, sum er næstaftast, men tað sást ikki á spælinum og úrslitinum. AB kom á odda, tá ið lítið korter var farið, og teir vunnu 4–0! Hetta var fjórða AaB tapið á heimavølli í heyst, og tað var ikki at undrast á, at áskoðararnir tíðliga í 2. hálvleiki fóru til hús. Undan hesum dystinum hevði AB í seks útidystum í hesum kappingarárinum bara skorað fimm mál íalt.

AGF vil fegið vera ímillum tey fremstu. Onkra ferðina spæla teir væl, men so detta teir niður í djúp hol. Soleiðis var sunnudagin, tá ið Viborg vitjaði og fór til hús við 4–2 sigri.

Farum var – burtursæð frá FCK – einasta av fremstu liðunum, sum vann. Teir høvdu vitjan av botnliðnum Silkeborg og vunnu 3–2. Christian Andersen, venjarin hjá Farum, helt, at teir høvdu víst besta spælið higartil í hesum kappingarárinum, og hann harmaðist um, at sigurin ikki var vorðin størri. Farum hevði nógvar møguleikar, men aftaná vóru teir nøgdir við at hava vunnið. Tað er væl skiljandi. Nógvur turbolensur var aftur í síðstu viku kring felagið. Fyrrverandi býráðsformaðurin í Farum og fyrrverandi formaðurin í Farum Boldklub, Peter Brixtofte, royndi aftur at fáa valdið í felagnum, men tað miseydnaðist.

## 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 6 | 6 - 0 - 0 | 147 | 120 | 27 | 12 |
| 2 | VÍF | 7 | 4 - 0 - 3 | 156 | 136 | 20 | 8 |
| 3 | StÍF | 7 | 4 - 0 - 3 | 168 | 167 | 1 | 8 |
| 4 | Neistin | 8 | 3 - 1 - 4 | 151 | 160 | -9 | 7 |
| 5 | Kyndil | 7 | 3 - 0 - 4 | 176 | 167 | 9 | 6 |
| 6 | Stjørnan | 6 | 2 - 1 - 3 | 122 | 130 | -8 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 7 | 1 - 0 - 6 | 134 | 174 | -40 | 2 |

## 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 8 | 6 - 0 - 2 | 261 | 202 | 59 | 12 |
| 2 | StÍF | 8 | 6 - 0 - 2 | 232 | 205 | 27 | 12 |
| 3 | Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 225 | 213 | 12 | 10 |
| 4 | Kyndil | 7 | 4 - 1 - 2 | 201 | 189 | 12 | 9 |
| 5 | KÍF | 8 | 2 - 1 - 5 | 201 | 207 | -6 | 5 |
| 6 | H71 | 7 | 2 - 0 - 5 | 161 | 199 | -38 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 8 | 1 - 0 - 7 | 190 | 256 | -66 | 2 |